

## Vilja eta meira fisk

**Svøríki:** Heili 77% av svenska fólkinum halda, at fiskur er betri fyri heilsuna enn kjøt og fuglur. Hetta vísir ein kanning, sum í síðsta mánaði varð gjørd í Svøríki.

Tveir triðingar av teimum spurdu vilja gjarna eta tvífalt so nógvan fisk, sum tey longu gera. Treytin er, at fiskurin verður bíligari at keypa, at hann er lættur at tilreiða, og at úrvalið av lidnum fiskaræ48ttum verður størri.

Eftirspurningurin eftir lidnum fiskaræ48ttum veksur, og ein orsøk halda fólk vera støðugar ávarðingar ímóti fiti.

Herfyri skipaðu Svensk Fisk og norska Eksportudvalget saman fyri eini kapping um lidnar fiskaræ48ttir. **(-vilmund)**

## Dýrt at halda nísum burtur

**Danmark:** Danmarks Fiskeriundersøgelse er komið eftir, at aukustiskar ávaringarskipanir, sum skulu halda nísum burtur frá fiskagørnum, saktans kunnu minkast niður í eina helvt.

Í dag verður kravt, at útróðrarmenn, sum royna við gørnum, skulu hava eina ávaringarskipan fyri hvørjar 200 metrar. Í summum førum hava menn so long gørn, at neyðugt er við 300 ávaringarskipanum. Hvør skipan kostar 600 krónur, og tí verður samlaði kostnaðurin av hesum 180.000 krónur.

Tað er ES, sum fyri tveimum árum síðan legði upp til, at slíkar skipanir skulu nýtast til tess at halda nísum burtur frá gørnunum. **(-vilmund)**

# Sera órímilig kapping í luftini

**- Hetta er ein órímilig kapping millum eitt lítið privat flogfelag, sum kappast ímóti einum stórum almennum flogfelag við nógvum almennum peningi aftanfyri seg og ongum krøvum um avkast til partaeigararnar, sigur Jóhan Simonsen, stjóri í FaroeJet**

FLOGFERÐSLA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsfundi Fólkafloksins í vikuskiftinum gjørdi nevndarformaðurin í FaroeJet, Knút Lutzen, bart og segði sína hjartans meining um ta kapping, sum privata flogfelagið, FaroeJet, er uppi ímóti á Føroyarutuni.

Sosialurin hevur skift orð við stjóran í FaroeJet, Jóhan Simonsen, sum er talsmaðurin hjá felagnum úteftir.

Hann sigur, at talan er um eina "kapping" millum eitt lítið, nýtt og privat flogfelag og eitt stórt alment flogfelag við nógvum almennum peningi aftanfyri seg.



*- Almenna flogfelagið hevur fingið vinnutól ókeypis frá Føroya landsstýri, eftir at FaroeJet fór í vinnu. Felagið hevur fingið hangarin og eina tyrlu frá landsstýrinum og saman við tyrluni ein kekk á 20 mió almennar krónur hvørt ár, sigur stjórin í FaroeJet, Jóhan E. Simonsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ongar spælireglur

- Privata felagið skal klára seg undir marknaðartreytum, men hetta er eftir okkara tykki ikki galdandi fyri almenna felagið. Ongar spælireglur eru fyri kappingini á loftferðsluøkinum, sum tí er vorðin órímilig fyri okkara privata felag.

Stjórin vísir á, at tá ið talan er um økir sum telesamskifti, oljusølu og bakaravinnuna, hevur Kappingarráðið, sum er stovnur undir Vinnumálaráðnum, verið inni í málum og sett ávís mørk fyri, hvat stór feløg kunnu loyva sær. Hetta er eitt nú hent í kappingini millum Føroya Tele og Kall. Men á loftferðsluøkinum er øðrvísi, tí her kann stóra almenna felagið at kalla gera, sum teimum lystir.

Jóhan Simonsen sigur, at almenna felagið hevur einki krav frá partaeigarum um avkast til partaeigararnar.

- Men tað hevur privata felagið hinvegin, leggur hann aftrat.

### Dumpar prísirnar

Stjórin sigur, at Atlantic Airways hevur "dumpað" prísirnar á farmi, og FaroeJet hevur tí í seinastuni heft seg við órealistiska lágar prísir á farmi.

- Almenna flogfelagið berjist móti privata felagnum við at seta yvirkapasitet inn á rutuna, har privata felagið flýgur, og fráferðir hjá almenna felagnum eru lagdar tætt upp at fráferðunum hjá privata flogfelagnum.

Jóhan Simonsen sigur, at almenna felagið eisini hevur sent eina ørgrynnu av bíligum flogferðaseðlunum í umfar.

- Hetta er órímiligt og líkist prísdumping á ferðaseðlaøkinum, heldur stjórin.

Hann leggur aftrat, at almenna felagið, sum í sínari tíð hevði gott samstarv við táverandi kappingarneytan, Mærsk Air, noktar stórt sæð at samstarva við FaroeJet – hóast gott grundarlag er fyri samstarvi.

- Samstarvast kundi eitt nú verið um farm, at flyta ferðandi millum feløgini og at sleppa undan ov stórum yvirkapasiteti.

### Ókeypis vinnutól

Stjórin sigur, at almenna felagið hevur fingið vinnutól ókeypis frá Føroya landsstýri, eftir at FaroeJet fór í vinnu.

- Almenna felagið hevur fingið hangarin og eina tyrlu frá landsstýrinum og saman við tyrluni ein kekk á 20 mió almennar krónur hvørt ár, sigur hann.

At enda vísir stjórin í FaroeJet á, at privatisering av almenna flogfelagnum júst er útsett.

- Tí kann almenna felagið halda fram við órímiligu kappingini við almennum peningi aftan fyri seg, har eingi krøv eru um avkast til privatar partaeigarar, sigur Jóhan Simonsen at enda.

## Fimm skeinkistøð løgd saman

**Café Natúr, Manhattan, Eclipse, Rex og Cippo eru nú øll løgd saman í eitt felag. Seks persónar standa aftan fyri samtakið, sum soleiðis situr á stórum parti av náttarlívinum í høvuðsstaðnum**

NÁTTARLÍV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru teir seks, Rúni Olsen, Runi Djurhuus, Háldan Haldansen, Hans Jørgen Djurhuus, Bárður Højgaard og Janus Einar Sørensen, sum standa handan nýggja felagið, sum skal reka tey fimm dansi- og skeinkistøðini, sum eru nevnd omanfyri.

Rúni Olosen, Bárður Højgaard og Janus Einar Sørensen eru allir nýggir í hesum høpi, meðan hinir tríggir hava verið aktivir innan bransjuna seinasta góða árið.

Enn hava nýggju eigararnir ikki tær heilt stóru viðmerkingarnar til tíðindini, og tað verður at kalla bert víst til tíðindaskriv, sum verður sent miðlunum.

Rúni Djurhuus, sum undan hesum hevur rikið Cippo og Manhattan saman við Háldan Haldansen, sigur, at fyrimunirnir í slíkar samanlegging eru fleiri.

- Sum er hava vit nýtt kreftirnar at kappast móti hvørjum øðrum. Sjálvandi verður ein ávís kapping um kundarnar framvegis, men við eini samanlegging vænta vit at fáa fleiri rakstrar-fyrimunir.

Men á hvønn hátt kemur kundin at merkja hetta?

- Tað er kanska ikki so lætt at siga. Men til dømis er tað upplagt, at tað er lættari hjá okkum at gera avtalur, tá vit hava eitt breitt konsept aftanfyri, sigur Rúni Djurhuus.

